Katrin Joensen-Næs
Landavegur 80
100 Tórshavn

Dagfesting: **7. november 2019**
Tygara ref.**:**
Máltal**.: 19/00440-3**

**Viðvíkjandi umsókn um stuðul til film seinna umfar 2019**

Víst verður til umsókn um stuðul til "Bollivinir".

Landsstýrismaðurin hevur sett tveir ráðgevar, Barbaru í Stórustovu og Hans Petur Hansen, at gera tilmæli um stuðul til film av filmsjáttanini og hevur staðfest øll tilmælini. Stuðulin verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014.

Vísandi til tilmælið frá ráðgevunum verður umsóknin gingin á møti, og játtaðar verða kr. 33.000 til endamálið. Sí tilnevning til avgerð niðast.

Stuðulin verður fluttur um Føroya Gjaldstovu á kontu í Suðuroyar Sparikassa 9870-9926810, tá tygum boða frá, at verkætlanin verður framd. Fráboðast kann umvegis teldupost til mmr@mmr.fo.

Játtanin er treytað av, at verkætlanin í høvuðsheitum verður gjøgnumførd, sum lýst í umsóknini. Um stórvegis broytingar mugu gerast, skal hetta fráboðast Mentamálaráðnum, áðrenn farið verður undir verkætlanina. Størri broytingar kunnu t.d. vera útskiftingar av sentralum luttakarum í verkætlanini. Harumframt eiga møguligar broytingar í eitt nú endamáli, fíggjarætlan og tíðarætlan at verða fráboðaðar.

Tygum verða vinarliga biðin um at lata Mentamálaráðnum roknskap og frágreiðing, tá verkætlanin er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir játtanarárið. Roknskapurin skal vísa inntøkur og útreiðslur av verkætlanini umframt eitt endaligt úrslit. Stuðulin skal verða tikin við sum inntøka.

Gjørt verður vart við, at ikki nýttur stuðul verður at flyta Mentamálaráðnum aftur. Mentamálaráðið tilskilar sær rætt til at krevja stuðulin afturgoldnan, um hann ikki er brúktur sambært játtaða endamálinum.

Til kunningar skal verða sagt frá, at TAKS fær avrit av øllum útgoldnum stuðli. Mentamálaráðið tilskilar sær somuleiðis rætt til at almannakunngera stuðulsveitingar.

Møguleiki er fyri at hitta ráðgevarnar til eina stutta uppbyggjandi samrøðu um umsókn tygara og niðurstøðuna. Um tygum ynskja eina samrøðu, vinaliga sigið Mentamálaráðnum frá í seinasta lagi mánadagin 11. november. Skrivið til aldaj@mmr.fo ella ringið á fartelefon 55 50 41.

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Alda Joensen
*fulltrúi*

# Tilnevning til avgerð um filmsstuðul – heystið 2019

**Navn á verkætlan:** Bollivinir
**Umsøkjari/umsøkjarar:** Katrin Joensen Næs
**Máltal:** 19/00440

**Lýsing av Verkætlan:**
Katrin Joensen-Nær søkir um stuðul søgu- og hugskotsmenning og undanframleiðslu av einum stuttfilmi á ætlandi 30 minuttir. Ítøkiliga inniber hendan undanframleiðslan menning og møguligar broytingar av handriti í samstarvi við ráðgeva.
Í stuttum snýr filmurin seg um Emiliu, sum er forelskað í sínum sokallaða bollivini. Kærleikin gongur ikki báðar vegir, men tað hevur Emilia ilt við at síggja og góðtaka. Endin er, at Emilia í ólukku mát hugsar meir og meir um, hvat er galið við sær. Av hesi orsøk byrjar Emilia at broyta seg sjálva, fyri at hann skal tekkjast henni, og endin er at einki er eftir av henni, hon var.
Við hesum stuttfilmi vil stigtakararin vísa, at tað, at hava kynsliga samveru uttan ábyrd fyri hvørjum øðrum, kann pína og oyðileggja fólk á ein heilt annan hátt, enn eitt romantisk samband kann.

(Oversættelse)
Beskrivelse af projektet:
Katrin Joensen-Næs søger om støtte til historie- og idéudvikling og preproduktion av en kortfilm på 30 minutter. Konkret innibær denne preproduktion udvikling og mulige ændringer af manuskriptet i samarbejde med konsulent.
I korte træk handler filmen om Emilia, som er forelsket i sin såkaldte bolleven. Kærligheden går ikke begge vegne, men det har Emilia svært ved at se og acceptere. Det ender med, at Emilia tænker mere og mere på, hvad der er galt med hende. På grund af dette begynder Emilia at lave om på sig selv, for at blive attraktiv for ham, og til slut er der ikke noget tilbage af den, hun var.
Med denne kortfilm vil initiativtageren vise, at det, at have et seksuelt samvær uden ansvar for hinanden, kan pine og ødelægge mennesker på en helt anden måde, end en romantisk relation kan.

Søkt verður um kr. 55.240,-

**Meting av verkætlanini:**
Hetta er ein filmur við nógvum kynsligum løtum, sum fara langt yvir tað markið, vit eru von við at halda okkum innanfyri í Føroyum. Til hetta kann tað gerast trupult at finna føroyskar leikarar. Stigtakararin leggur dent á, at sex er ein sentralur og natúrligur partur av okkara gerandisdegi. Tó, har frá og til at skriva eitt so spekkað treatment við sex er kanska ov vági.
Umsøkjari, ið eisini er høvundur, framleiðslu- og leikstjóri hevur góð fólk afturat sær í sambandi við framleiðsluna av hesum filmi, men áðrenn víðari framleiðslan tó fer í gongd, mæla

filmsráðgevarnir høvundi og ráðgeva til, at umskriva søguna eitt sindur soleiðis, at hon gerst borðbærari. Eisini mæla filmsráðgevarnir teimum til at endurskoða sjangruna á filminum soleiðis, at hon heldur seg meiri til álvaran, høvundurin sigur seg stremba eftir, enn komediuna, filmurin í løtuni endurspeglar.

(Oversættelse)
Vurdering af projektet:
Dette er en film med en stor del seksuel øjeblikke, som går langt over de grænser, vi plejer at holde os indenfor på Færøerne. Derfor kan det blive svært at finde færøske skuespillere. Initiativtageren understreger, at sex er sentral og naturlig del af vores hverdag. Derfra og til at at skrive et treatment så spækket med sex er måske for vovet.
Andsøger, som også er forfatter, producer og instruktør har gode folk med sig i forhold til produktionen af denne film, men inden produktionen går i gang, så råder filmsrådgiverne forfatter og rådgiver om, at omskrive historien lidt, så den bliver stuerænere. Også råder filmsrådgiverene dem til at genskue sjangren i filmen sådan, at den holder sig mere til alvoren, forfatteren siger sig stræbe efter, end komedien, som filmen i nuværende øjeblik genspegler.

**<u>Niðurstøða um stuðul:</u>**
Mælt verður til at stuðla verkætlanini við kr. 33.000,-

**Hans Petur Hansen og Barbara Hentze í Stórustovu – ráðgevar**